# handVERKARIN

3. ÁRSFJÓRÐINGUR 2009 BLAÐ NR. 31 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# Starvsfólkini í Handverksdepli



*Eli Brimsvík formaður í Havnar Handverkarafelag*



*Petur Juul Jacobsen stjóri í Eftirlønargrunninum*

Í vár flutti Havnar Handverkarafelag skrivstovu sína úr Sjúrðargøtu yvir í ogn felagsins í Stoffa-lág 60. Og nú hava Havnar Handverkarfelag, Eftirlønargrunnurin, Landsfelag Handverkar-anna og Føroya Prentarafelag gjørt avtalu um skrivstovusamstarv; soleiðis, at feløgini nú øll eru undir sama taki í Stoffalag 60. Bygningurin verður nevndur Handverksdepilin í Stoffalág 60.

## Innihald


| | |
|---|---|
| **Starvsfólkini Handverksdeplinum í Stoffalág** | **2** |
| **Útleigan til limir og onnur** | **4** |
| **Víkingaskip: Væla handverk og stór vitan** | **6** |
| **Manntal í 2011 gevur nýggja neyva vitan** | **11** |
| **Ástarbrævið: Søga úr Letlandi** | **24** |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag • Stoffalág 60 • Box 203 • 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl 9 til 15.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo



*Marita í Brekkunum skrivstovukvinna*



*Rosely Reynstind skrivstovukvinna*



*Jonna Skaale skrivstovukvinna*

## Handverksdepilin

Feløgini hava felags skrivstovutíðir í Handverksdeplinum.

Avgreiðsla er mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15. Tlf. 35 48 00, Fax. 35 48 01 Teldupostur: handverk@handverk.fo

## Starvsfólk

Tey sum starvast í Handverksdeplinum eru: Eli Brimsvík formaður í Havnar Handverkarafelag, Petur Juul Jacobsen stjóri í Eftirlønargrunninum, Marita í Brekkunum skrivstovukvinna, hjá Havar Handverkarafelag, Jonna Skaale skrivstovukvinna hjá Eftirlønargrunninum og Rosely Reynstind skrivstovukvinna hjá Eftirlønargrunninum.i.

# Útleigan til limir og onnur


*Garderoba*

## Reglugerð fyri nýtslu av hølunum í kjallarahæddini í Handverksdeplinum

1. Hølini kunnu útleigast til limir, eins og onnur uttanfyri felagið; talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

2. Farast skal væl um hølini, og skulu tey latast aftur í sama standi, sum tá ið tey vóru útleigað.

Møguligir skaðar á innbúgv og útbúnað undir útleigan, skal alt fyri eitt fráboðast felagnum, og fult endurgjald fyri umvæling/nýkeyp skal rindast felagnum.

3. Hølini verða leiga út til hesi endamál:


*Fundarsalur*



Køkur

A. Vanlig tiltøk og fundir eftir vanliga arbeiðstíð.
B. Tiltøk, ið eru í vanligari arbeiðstíð og eftir vanliga arbeiðstíð.
C. Tiltøk ið fevna um meira enn ein dag.
D. Framsýningar, eftir nærri avtalu.
E. Merkisdagar (t.d. føðingardag/ fermingardag)
F. Skeiðvirksemi.

4. **Prísir.**

Er talan ikki um limir er kostnaðurin við køki pr. kvøld 2.000,- kr.
Limir leiga hølini til Merkisdagar (inkl. nýtslu av køki) fyri 1.000,- kr.

.

Er talan um onnur tiltøk, sum t.d. fevna um fleiri dagar, verður nærri prísur avtalaður.



# Víkingaskip: Væla ha

**Tíðum verður í kvæðum og søgum tikið til før víkinganna, og spard verða eingi málandi orð fyri at lýsa, hvussu stór og prýðilig tey vóru: *"forgyltir vóru báðir stavnar, borðini vóru blá ..."* og *"Lunnar brustu og jørðin skalv, teir drógu knørr úr neysti ..."***

Sjálvsagt, hetta er skaldskapur sum eina letur okkum hóma, at menn í seinni tíðum hava hildið hesi før verið stór og glæsilig. Eitt sindur meira álítandi eru kortini frásagnir í gomlum skjølum og søgum; men álítandi vitan fingu vit ikki fyrr enn í 1800-árunum, tá ið teir fóru at finna meira og minni væl varðveitt skip og bátar í gravheygum.

## Víkingaøld – 800-1.000

At hetta kundi henda er tí, at tað víða hvar í Norðurlondum, serliga í víkingaøld, 800-1.000, men eisini fleiri hundrað ár frammanundan, var siður at jarða fólk, menn og kvinnur, í einumhvørjum fari. Tað tykist sum hesin siður var vanligastur framvið strendur Noregs, har teir ikki bara hava jarðað stórmenn, kongar og høvdingar, í skipum, men eisini fólk flest. Har hava teir nú funnið fleiri hundrað slíkar bátagravir, summar við miklum gravgóðsi.

Hvat ið liggur aftanfyri henda gravsið er óvist, men ein orsøkin er óivað tann, at menn tá vóru serliga hegnigir bátasmiðir, og at sjóferðir teirra vundu uppá seg. Siðin høvdu teir eisini í Finnlandi og Svøríki og Danmark.



***Norska Gokstadskipið***
*Stýrið í Gokstadskipinum líkist mest eini ár, sum liggur at borðinum aftur móti lyftingini í stýriborð. Tað verður hildið at stokkinum av breiðari, flættaðari húðarreim, sum er løtt at loysa og binda.*
*Men sjálv stýrisfestan er longur niðri, har stýrið liggur at tjúkkum eikioka.*
*Gjøgnum okan og eitt hol í sjálvum stýriblaðnum gongur ein liðilig viðja, vundin av fururót og fest at tí sonevnda stýrisbandinum innanborða. Viðjan ger tað møguligt at snara stýrinum við róðurarmi, sum er feldur inn í ovara enda á stýrishálsinum, og sum vendir inn í skutin, har stýrimaðurin sat.*
*Í ovasta borði – rimini – eru hol fyri 15 árum í hvørjum borði.*

# ndverk og stór vitan



*Norska Osebergskipið er 21,44 m langt, 5,10 breitt og 1,60 djúpt miðskips; alt úr eikiviði. Í skipinum varð stór mongd av gravlutum funnin t.d. ein vognur við 4 hjólum, tríggjar avbera vakurt útskornar sleður. Kistur fullar av amboðum t.d. saksar, lampur, køksamboð, sengur, dýnur, koddar og klæði. Uttanfyri skipið lógu 15 hestar, 4 hundar og ein oksi. Osebergskipið hevur ikki verið havgangandi skip.*

## Eisini føroyingar

At teir landnámsmenn, sum fóru vestur í hav, høvdu siðin við sær, vísa fund í teim fornu norsku oyggjaríkjunum sunnanfyri okkum og í Íslandi. Í Føroyum er eingin bátagrøv funnin, men at føroyingar hava verið øðrvísi enn okkara grannar er lítið sannlíkt, og ein slík grøv kann tí sjálvandi eisini verða funnin í Føroyum í framtíðini. Tað, sum er avgerandi er um lendi, har bátar eru grivnir, er ført fyri at varðveita tilfarið.

Eina aðra orsøk til at bátur er nýttur til jarðarferðina halda teir vera tað, at tann deyði skuldi sigla langa leið um hav. At siglingartjóðir høvdu slíka hugsan er lætt at fata, annað er, at vit einki vita vist. Sagnir og søgur hjálpa ikki her, hvussu so vakrar tær eru.

## Skjold og Baldur

Lat okkum her nevna søgnina um danska kongin *Skjold*, ið sum barn kom siglandi frá



*Í 1904 var stór víkingagrøv funnin í Oseberg við Oslofjørðin.*
*Í grøvini vóru tvær kvinnur jarðaðar í víkingaskipi, saman við stórari mongd av gravlutum. Serfrøðingar hava roknað seg fram til, at kvinnurnar eru jarðaðar í árinum 834. Skipið verður í dag nevnt Osebergskipið, og er mest umfatandi víkingagrøv, sum higartil er funnin.*

ókendum heimi til Danmarkar. Danir kjósa sær hann til kongs og goyma skipið. Tá ið hann er deyður, bera teir hann umborð á tað, geva honum ríkar gávur, skjóta frá og skipið fer við fullum segli út aftur á hav til ókunnuheimin, haðan ið tað kom.

Og guðasøgnina um deyða Baldurs. Størsta skipið verður drigið á sjógv, á tí skal Baldur verða brendur. Kona hansara *Nanna* doyr tá av sorg, og verður eisini borin út á skipið. Hestur Baldurs verður dripin og lagdur umborð. Tá ið eldurin er kyndur, blaka Gudarnir ríkar gávur inn í bálið.

Av hesum søgunum sæst, at teir stundum brendu skip, lík og gravgóðs, stundum ikki. At hetta í royndum var so, prógva fundirnir.

Sjáldan er nógv til eftir av bátinum; er hann brendur, næstan einki, men eisini teir óbrendu eru oftast so fúnaðir, at bara jarnseymir ella farvegurin av borðunum sæst í moldini; eina har ið jarnfláirnar eru tjúkkar og tættar, er alt varðveitt. Og hetta er oftast bara gjørt, tá ið tann jarðaði var so mætur, at einki er spart fyri at verja grøvina.

Tí eru teir góðu skipafundirnir frá víkingaøld, sum rættiliga siga okkum nakað, so fáir. Teir kendastu eru úr Noregi: *Tune-skipið* sum var útgrivið í 1867, *Gokstad-skipið* 1880 og *Oseberg-skipið* 1904.

## Trý skipasløg

**Tune-skipið** varð funnið í *Båthaugen* í 1867.



*Gokstadskipið varð funnið í 1880. Skipið er 23,3 m langt, 5,25  breitt og 1,95 djúpt.*
*Skipið hevur verið havgangandi; av tí smærra slagnum. Tað hevur verið lætt at róg og ófört undir segli. Tað var prógvað í 1893, tá siglt var úr Noregi til Amerika, við einum skipi, sum í øllum lutum var bygt sum Gokstadskipið.*

Hetta skipið stóð suður-norður. Aftan fyri miðjuna var bygt gravkamar, í tí lógu brend mannabein og rossabein umframt 2 glasperlur og ein toylepi. Tað er tíðarfest til o. u. ár 900 nógv var ikki eftir av hesum skipi, men ætlandi hevur tað verið 20 m langt millum stevna uttan, 4,35 m breitt um miðjuna og 1.20 djúpt, sera sterkt bygt.

Hetta skip, eins og systirskipini Gokstad- og Osebergskipið, standa nú inni í tí stóra víkingaskipahúsinum úti á *Bygdøy* við Oslo.

Hini bæði eru endursmíðað, hetta stendur sum tá ið tað var tikið út úr heygnum; næstan bara botnurin er eftir. Samanborið við hini, sýnir tað ikki av nógvum og tó hevur tað óivað einaferð verið eitt vakurt skip tó at tað er flátt og lágborðað.

## Gokstadskipið

Úr *Kongshaugen* gróvu teir í 1880 fram tað nú so víða gitna *Gokstad-skipið*, – víkingaskipið fram um øll onnur.

Tað var grivið í bláleir, við framskutinum móti sjónum; síðan hevur gravkamar verið bygt og masturin høgd av í hædd við kamarið. Í tí var gravsettur ein høvdingi; hann var lagdur í song sína, latin í síni bestu klæði og við sær hevði hann fingið øll vápnini.

Rannsókn av beinunum vísti, at hesin maður var o. u. 50 ára gamal, 178 cm høgur. Trúliga *Olav Geirstad-Alv* kongur, sum grivin er her o.u. ár 900.

Annars var í skipinum funnið, umframt song kongsins 5 aðrar sengur, ein stórur bronsuketil, jarnskerðingur, diskar, koppar og tunnur, klæði úr silki og úr ull, eitt talvborð, spenni o.a. úr jarni, gyltari bronsu og blýggj.

Uttanfyri skipi lógu minst 12 hestar og 6 hundar og inni í skipinum ein páfuglur – sjálvsagt eitt sjáldsamt og kostiligt djór.



*Útskorin vognur – úr Osebergskipinum.*

## Føroyskir bátar

Men forvitnisligastar eru tó, serliga fyri ein føroying, leivdinar av 3 bátum, sum lógu í framskutinum. Hesir eru bygdir á sama hátt sum skipið og minna nógv um bátar okkara, sum óivað eru ættaðir frá hesum førum. Høvuðssnið og smíð er tað sama, men teir eru væl reystari og rankari enn føroyskir bátar, og røðini eru heilt øðrvísi; áranar leikaðu ikki í tolli, men í keipi sum var ein slags tollur evnaður úr eini hentari grein ella telgdur úr hørðum sterku viði, og líktist mest horni á hvali.

Allir bátarnir lógu í knasi, men við drúgvum strevi hevur nú eydnast at seta brotini saman; tann størsti av teimum stendur nú eisini í víkingaskipahúsinum úti á Bygdøy.

## 23,33 m langt millum stevna

Gokstad-skipið sjálvt er 23,33 m langt millum stevna uttan, 5,25 m breitt um miðjuna og 1,95 m djúpt; alt úr eikiviði. Masturin stendur í stórum vakurt evnaðum viðarkubba, teir nevna "mastefisken". Umframt er her stýri, rá við dragi, árar, tiljur, akker, eyskør o.s. fr..

Ein og hvør sum sær hetta skip verður hugtikin av vakurleika tess. Eyðsæð er, at hetta ikki er fyrsta farið, hesir fullkønu bátasmiðir hava bygt; aftanfyri slíkt listaverk mega liggja mangar royndir. Tað er úrslitið av góðum sjómansskapi og handaverki, sum fet fyri fet gjøgnum øldir er komið so langt. – Forvitnisligt er at eygleiða gongdina, frá Hjortspring-bátinum, sum er funnin í Danmark, og sum er o.u. 2000 ára gamal, yvir Halsnøy- bátin í Noregi frá o.u.



ár 200, Nydambátin í Slesvig frá o.u ár 400, Sutten-Hoo bátin í Englandi o.u ár 600, Kvalsund-bátin í Noregi o.u ár 600, Fjørtoft-bátarnar í Noregi frá 5-8 øld til Osebergskipið o.u. ár 800, og Gokstad-skipið o.u. ár 900.

## Borð og umfør

Gokstadskipið er súðubygd, tey 16 umførini klinkað aftan á at síggj vandaliga er lagt ímillum.

9 tey niðastu eru evnað úr smidligum borðum, sum eru surrað, ikki negld, til bondini. Hesum skulu vit geva gætur; ivaleyst er hetta arvur frá teim nógv eldri seymaðu bátunum og hildin uppi tí at botnurin á hendan hátt var liðiligari og skipið tí kimiligari og lættari bæði undir segli og árum.

10. borðið er 4,3 cm tjúkt, tað er hetta teir nevndu "meginhúfr" t.e. borðið, sum styðjar og styrkir alt skipið. Móti tí liggja bondini, 19 í tali og bitarnir, sum svara nakað til bekkir okkara, 3 tey næstu bondini eru tynri og negld inn á knø, og so kemur 14. Borð, "róðrahúfr"; í tí vóru áraholini, – á hesum skipi 16 í hvørjum borði. Árarnar stungu teir út gjøgnum hesi innanífrá, og róð var í teimum. Tá ið teir sigldu, smoygdu teir smáar rundar trælúkur fyri, so sjógvur ikki rann inn. Tey tvey ovastu borðini tóku skvampin.

## Sótu helst á skipskistu

Hvørjum teir sótu á og róðu, veit eingin, helst sat hvør maður á skipskistu síni á tiljudekkinum.

Uttaná síðuni er negld mjá rim, rimin ella skjaldarrimin nevnd, í hesi sótu skjøldirnir, 32 í hvørjum borði annarhvør málaður svartur annarhvør gulur, bundnir til rimina.

Stýrið hongur uttan á stýriborði; tað líkist eini stórari ár, men er eitt fullkomið amboð, fest við tjúkkari viðju.

Stýrihálsurin røkkur o.u 50 cm upp um stokkin, og í hesum situr tann 1 m langi stýrisvølurin, einasti partur í øllum skipinum, sum



*Spann – úr Osebergskipinum.*

er útskorin; alt hitt, borð, bond, o.s.fr. er tó listhølvað. Tiljan omaná aftasta bandi liggur eitt sindur hægri enn tiljudekkið annars; hetta er lyftingin.

## 3 eftirbátar

Eitt og hvørt skip skuldi frá gamlari tíð hava skipsbát, eftirbátur æt hann. Her vóru heilir 3 bátar; hin størsta hava vit hoyrt um, hann er 9,75 langur, og hevur 5 árar í hvørjum borði; annar 8 m langur, og triði 6,60 m langur hevði 2 árar í hvørjum borði, hesin man vara eftirbáturin, hin óivað útróðrabátar.

Drekastavnar vóru eingir til, men hava tað helst, í minnsta lagi eru bæði sengur og tjaldastengur prýddar við útskornum, málaðum drekahøvdum.

## Gokstadskipið havskip

Gokstadskipið hevur verið havskip av tí smærra slagnum, sum teir gomlu nevndu karfi, - tað hevur verið lætt at rógva og óført undir segli, sum prógvað varð, tá ið teir í 1893 sigldu úr Noregi til Amerika í skipi, sum í øllum førum var bygt sum Gokstadskipið.

Undir tiljudekkinum var rúm til farm o.a. men tiljurnar liggja leysar, so vanligt dekk høvdu tey ikki hesi skip, sum í roynd meira eru stórir opnir bátar enn skip. Bara tespiligt hevur neyvan verið at ferðast um høv í teimum

## Oseberg-skipið

Oseberg-skipið lá fyri ýla, við tað at tog frá forstavninum var bundið um stóran stein framman fyri. Aftanfyri mastrina var gravkamarið, í tí vóru heygsettar tvær kvinnur, onnur o.u. 30 ára gomul, hin o.u. 70 ára gomul. Við sær høvdu tær fingið so mikið nógv, sum hvørki fyrr ella seinni er sæð í eini víkingaaldargrøv: sengur, dýnir, koddar, klæði, vanlig teppi og mynstra- og myndavovin. Kistur fullar av búnýtum og amboðum: Saksum, lampum, bankitrøum, umframt súrepli og heslinøtir, køksamboð, krakkar trog og kvør. Og ein vogn við 4 hjólum, 3 avbæra vakurt útskornar sleður, ein vev, tvey tjøld o.s.fr.

Og so alla skipsútgerðina: Árar, akker, og tílíkt. Uttan fyri skipi lógu 15 hestar, 4 hundar og 1 oksi.



*Norrøn sólkumpass, funnin í útgrevstri í Grønlandi..*

## Ása, omma Haralds Hárfagra

Teir ivast ikki longur í, at tann yngra kvinnan er Ása, omma Haralds Hárfagra, sum má vera gravsett seinna helming av 800-árunum, og at hin eldra er gomul tænastukvinna hennara.

Skipið er væl eldri. Skurðverk á stevnunum vísa, at eitt gamalt skip frá o.u. ár 800 er nýtt sum gravskip til hesa ungu drotning. Eisini tað at allar, árarnar, 30 í tali, og stýrið skilliga eru nýsmíðað, vísa hetta.

## 21,44 m langt millum stevna

Oseberg-skipið er 21,44 m langt millum stevna uttan, 5,10 m breitt miðskips og 1,60 m høgt; alt úr eikiviði, men veikari bygt enn Gokstad-skipið og væl meiri lágborðað.

Í hvørjum borði hevur tað 15 árar. Alt samalt vísir, at hetta ikki er ætlað at vera havskip, men skreytskip.

Teir longu, mjúku stokkarnir hevja seg móti báðum stavnum upp í ein boga 5 m omanfyri vatnið. Hesir høgreistu stavnar eru bara til prýðis, og sama er at siga um teir fagurt útskornu stevni, har djóramynstur klúgva upp frá vatnsborðinum til ormahøvdið ovast uppi.





*Útskorið høvd.*

Ormurin er skipsins prýði, men hann er eisini tess vernd og eydna, og hann er meira, hann er tekin um at skipið var hugsað sum livandi vera, sama hugsan sum veldir at øll skip hava sernøvn.

Tá ið so er, hvat er tá meiri náttúrligt enn at hugsa sær skipið sum ein orm, ið ringir seg gjøgnum sjógvin. Tí er ormsins høvur á forstavninum, og tí endar bakstavnurin sum ein ormastertur.

## Karfar og havgangandi skip

Hesi skip eru karfar, tað eru skip, sum stórmenn lótu byggja sær til ferðir serliga fram við landi, Oseberg-skipið sigur sjálvt frá hesum; eingin hevði torað út á hav í so veikum fari. Øðrvísi er Gokstad-skipið, tað er ólíka meiri sjógott og havgangandi, men havskip, farmaskip er tað tó ikki.

**Úr Bergen til Grønlands**

*Til Grønlands varð siglt millum Føroyar og Hetland.*




Hesi farmaskip, sum itu knørrar ella byrðingar, vóru breiðari og djúpari, og uppaftur størri vóru krígsskipini, langskipini, serliga seinri í víkingaøld og í miðøld. Hugsið bara um Ormin langa, sum var 35 m langur, hevði 34 árar í hvørjum borði; 3 mans vóru um hvørja ár, so bara róðrarmenninir vóru 204 tilsamans. Hildið verður at manningin var o.u. 500 manns.

## Stjørnurnar

Tað størsta skipið, teir vita um var Kristsuden, bygt í Bergen 1262 til Hákun Hákunsson.

Eitt er at byggja góð og vøkur skip, annað er at sigla við teimum og finna leið um høv.

At Finna suður til Meðalhavið og fyri alt tað til Englands er ikki so ringt, tá ið siglt verður fram við landi, men at finna Føroyar í Atlantshavi og koma vestur til Grønlands og Vínlands (Amerika) er ikki so lætt. Her tørva amboð, sum teir mega hava havt.

Sjálvsagt hjálpti Norðstjørnan, leiðarstjørnan, teimum at finna norðan og finna hvar teir vóru. Men um summarið, árstíðin teir sigldu, eru ongar stjørnur her á leiðum; henda hjálpin var tí ofta ivasom. Sama er um gamla ráðið, at seta lús á ein spón, ella bekkin, lúsin skreið altíð norðureftir, siga tey. Lýs mundu neyvan tróta, men um hetta er regluligt ráð ella skemt, er annað mál.

## Sólarsteinur

Kumpas, leiðarsteinur, kom ikki til Norðurlanda fyrrenn í 1200-árunum; harafturímóti hava víkingar helst havt annað amboð, teir nevndu sólarstein. Við hesum amboði afturat kunnleika teirra til sólina og gongd hennara, hava teir funnið veg úti á víðum havi.

Hvat sólarsteinur var, veit eingin longur; fyrr hildu teir hann vera eina hvørja klára tinnu, sum hildin var fyri sólina, og at tað hevur borið soleiðis at ætla um, hvar ið sólin stóð, hvat ið var fram o.s.fr. ella tað var ein í klett høgt klingra ið við foyrum var býtt í ættir, sum til dømis tað í helluna úti á Tinganesi høgda kumpassið ella sólurið. Men hetta er á landi, og beint er ikki ber til at taka Tinganes við sær út á hav, so umborð mega teir hava nýtt annað amboð. Og ymsir nýggir fundir og rannsóknir tykja vísa, at amboðið hevur verið lítið runt træpetti, o.u 7 cm í tvørmát, 0,6 cm tjúkt og við einum 1,5 cm víðum holi í miðjuni;

í hesum hevur niðri undir sitið handtak og omaná ein pinnur, sum legði skuggan frá sólini niður á smá hakk, sum skorin eru rundan um á klingrurondini, og sum vísa ættirnar.

Eitt brot av hesum amboði varð funnið í tí forna Siglufirði (Unartoq) í Grønlandi 1948 (sí mynd á síðu 12).

Standandi við hesum í hondini, kundi tann køni maðurin umborð, leiðsagnarmaðurin, altíð finna aftur á beint henti tað, sum ofta var, at teir róku úti á villum havi í ódnarveðri og vóru vilstir.

## Íslendingasøgur

Í hesum sambandi er vert at nevna tað, sum Óli Olsen greiðir frá, um forna siglingarvegleiðing, í bók síni Sigling og útbúgving. Íslendingasøgur siga frá um mangar áhugaverdar hendingar í Norðuratlantshavi. Og hóast tær hava livað á mannamunni í øldir, áðrenn tær vóru niðurskrivaðar, so eru tær ikki minni áhugaverdar fyri tað. Í Hauksbók, ið er skrivað við Landsnámsbók sum grund, eru heilar 6 siglivegleiðingar í Norðurhøvum. Ein teirra ljóðar soleiðis: Frá Hernum í Noregi (við Bergen) siglt í beinan vestan til Hvarf (Hvarvið) í Grønlandi, og tú hevur tá siglt norðan fyri Hjaltland (Hetland), soleiðis at tú hómar land í klárum veðri, og sunnanfyri Føroyar, soleiðis at havið stendur um hálvar líðirnar, og sunnanfyri Ísland, at tú sært fugl og hval harfrá.

Stutt og einføld vegleiðing, løtt at minnast, og mundi tað ikki eisini vera endamálið í eini tíð, tá ið alt var goymt í minninum?

Einki orð verður greitt um navigeringina, men vit mugu gera okkum greitt, at var vegleiðingin einføld, so var siglingin tað ikki. Tvørturímóti (sí mynd á síði 14).

## Forn siglingaramboð

Í 1948 kom undan kavi lítil fornlutur í Eysturbygdini í Grønlandi, sum tíðarfest er til umleið ár 1000. Hesin lutur var beinanvegin settur í samband við forna sigling. Hann er úr viði, hálvmáni í skapi, 5 sentimetrar í tvørmát og rundumegin útskorin eins og kumpassstrik á at líta.

Við hesum fornminni søgdu granskarar seg endiliga hava fingið prógv fyri, at norðbúgvar nýttu peiliskivu, tá ið teir sigldu. Við fornlutinum sum fyrimynd, og sum hon var at



*Peiliskva.; hevur helst verið vanligt navigatiónstól í víkingatíð.*



*Sleda – funnin í Osebergskipinum*

hava sæð út upprunaliga, vóru nú nýggjar peiliskivur evnaðar. Í hesum sambandi má ein íslendingur nevnast.

Hann búðu á Flatey á Norðurlandinum, Oddur Helgason at navni, var mest at kalla stjørnufrøðingur, og har um leiðir nevndur Stjørnu-Oddur. Um ár 1000 gjørdi hann peiliskemu yvir sólina, tá ið hon rísur og setur – kannaði sveigvíddina árið í kring. Somuleiðis gjørdi hann talvur, ið vísti meridianhæddina – tá ið sólin stendur í suðri og hægst – alt árið. Hugsa vit okkum, at samtíðarmenn yvirhøvur hava vitað um hesi viðurskifti, ber til undir vanligum umstøðum at skilja fornu siglingina um høv.

Men søgan um fornlutin úr Eysturbygdini endar ikki her. Í 1978 gjørdi svenskur stjørnufrøðingur vart við nakrar skøvur, ið vóru á lutinum, og sum hann hevði granskað. Hann var komin til tað úrslit, at tvær av strikunum væl kundu vera sólarskuggalinjur, sonevndar gnomonkurvar. Hevði hann rætt í hesum, so var talan um eina sólarkumpass. At fáa staðfest, um ristingarnar vóru tilvildarligar ella gjørdar við ávísum endamáli fyri eyga, var farið til kriminalløgregluna at fáa serkanningar gjørdar. Úrslitið var, at skøvurnar vóru gjørdar til ávíst endamál, og fornminnið verður nú umrøtt bæði sum peiliskiva og sólarkumpass.

## Ravna-Flóki og sigling hansara

Í norrønum bókmentum fáa vit fyrstu ábendingarnar um magnetjarnsteinin í Landnámabók, frá uml. 1240. Tað er í sambandi við norska víkingin Flóka Vilgerðarson, sum í 9. øld ætlaði sær til Íslands at seta búgv. Við sær hevði hann tríggjar ravnar, sum vísa skuldu leiðina.

Fyrsti ravnurin var skjótur aftur eftir at vera sleptur á flog. Annar fleyg runt eina løtu, og so var hann aftur, meðan triði helt avstað og kom ikki aftur. Við at stevna somu leið sum hesin ravnurin fann Flóki Vilgerðarson Ísland. Tí varð hann róptur Ravna-Flóki.

Frágreiðingin í Landnámsbók er áhugaverd, tí eftir orðingini skilst, at høvundurin kendi magnetjarnsteinin. Hann sigur soleiðis: "Teir skuldu vísa honum leiðina, tí tá á døgum høvdu havsiglingarmenn ikki leiðarstein (magnetjarnstein) í Norðurlondum.

## Harðbaldnir sjómenn

Logg var einki; ferðslan á skipinum hava teir ætlað um. Enn liva menn í Føroyum, sum, meðan teir í yngru døgum sigldu, minni litu á loggið enn á metingina sína egnu bara við at hyggja fyri borð, ella við at sleppa træflís úr frammi á bógnum og kanna eftir, hvussu skjótt hon rak afturvið, – soleiðis hava teir gomlu óivað eisini gjørt.

Vit, sum í dag ferðast somu leiðir sum forfedrarnir men sita heitt og fløtt í ovurstórum skipum, ið hava allar hugsandi hentleikar, duga ikki at meta tað bragd, ið teir gomlu gjørdu, men tess meira vit hugsa um tað tess meira veksur virðingin fyri teimum, – lat vera at mangir teirra vóru reinir sjórænarar og harðir hálsar, men menn vóru teir, harðbaldnir sjómenn.



*Sólskuggafjølin at áseta sólarhæddina tykist hava verið serføroyskt siglingaramboð. Pinnin í miðjuni – styllin – bar til at flyta upp ella niður, alt eftir hvør árstíðin var.*





SPEKT løggildir grannskoðarar Spf.
spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn
Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35

SPEKT løggildir grannskoðarar

# Manntal í 2011 gevur nýggja




**Fyri fyrstu ferð síðani 1977 skal manntal aftur haldast í Føroyum. Eitt manntal gevur eina neyva hagfrøðiliga lýsing av, hvør býr í Føroyum og hvussu vit búgva her.**

*Stabbarnar uttast til høgru fyri hvør árið vísa – ikki óvæntað - at prosentparturin av fólkinum, sum vóru 90 ár ella eldri er vaksin seinastu 200 árini. Men hyggja vit eftir kvinnunum og monnum, so vísa stabbarnir, at 1801 vóru tað fleiri menn, sum vóru 90 ár ella eldir, men í 2009 er púra viðvent í holduni. Gomlu kvinnurnar er nógv størri partur av fólkinum. Hetta kunnu granskarar ella onnur so hugsa eitt sindur um.*

Góðan morgun. Eg hyggi í spegilin og haldi, at eg eri í so rak. Men tað er bara nakað, sum eg haldi í morgun. Eg veit tað ikki.

Fari síðani yvir á vektina og har niðri millum vinstru og høgru stóritá sæst eitt kilotal. Tað sigur nakað meiri enn spegilsmyndin, men um eg samanberi tølini seinastu mánaðarnar ella árini, so gevur talið í morgun meining og kanska ber til at leita eftir orsøkum til broytingar.

Í november 2011 fara allar Føroyar upp á vektina. Manntal verður hildið. Hvørt húski fær eitt spurnablað, har svarini skulu skrivast fyri hvønn persón í húskinum. Nakrar dagar seinni kemur eitt umboð fyri Manntal á gátt eftir spurnablaðnum.

Úrslitið er, at tøl av øllum handa slag verða oyst inn í grunnarnar á Hagstovuni. Útaftur koma hagtøl, sum neyvt lýsa, hvussu Føroyar sóu út hendan novemberdagin í 2011.

Manntalið fer at lýsa, hvussu tað er at liva í Føroyum. Hvussu fólk búleika, hvørjum tey liva av, hvat tey hava lært og hvar tey hava verið. Hvussu umstøðurnar eru at sova, eta, matgera og kroka. Hvørjum høpi tey liva í. Stutt sagt hvørja tilveru fólka hava.

Spurnablaðið verður býtt upp í tríggjar høvuðspartar. Spurningar til tann einstaka, til alt húskið og spurningar um bústaðin.

Einstaklingurin verður spurdur um eitt nú arbeiði, ferðing millum heim og arbeiði, og frítíðaráhugamál.

Spurningarnir til húskinum vera millum annað um: Hvussu eru føroysku húskini sett saman, hvør býr saman, hvussu búgva tey og so víðari.

Í triðja lagi vera nakrir spurningar um sjálvan bústaðin. Hvussu nógv eiga og hvussu nógv leiga, hvørjar hentleikar hava fólk í sínum býli.

Søgufrøðingar kunnu granska í tølunum og samanbera við onnur manntøl, sum hava verið í Føroyum ella uttanlands.

Politikarar og onnur áhugað kunnu brúka

hagtølini fyri at broyta gongdina ella støðuna í samfelagnum eftir teirra tykki.

Og børn, abba- og ommubørn okkara fara um eini 60-70 ár at smílast, tá tey síggja lýsingina av, hvussu Føroyar vóru skrúvaðar saman hendan novemberdagin 2011.

## Ein søgulig hending

Eitt manntal eigur ikki at vera ein leyst hangandi hending, men ein hending sum er inni í eini søguligari gongd. Ein hending, sum heldur aðra hondina í seinasta manntalinum og rættir hina út eftir tí næsta.

Fyrsta manntalið í Føroyum var í 1801, har spurt var eitt nú um, hvør búði hvar, navn, starv, hvussu fólk vóru skyld við hvørt annað. Síðani hava fleiri manntøl verið hildin í Føroyum og fyri hvørja ferð er fovitnið vaksið hjá fyriskiparunum.

Enn er spurnablaðið til manntalið 2011 ikki liðugt, men greitt er at har verða spurningar við, sum ikki áður hava verið settir á einum manntali. Eitt nú spurningar um internet, teldur og annað tøkni hjá húskinum.

## Alt skal brúkast til hagtøl

Tað er Hagstovan, sum hevur evstu ábyrgdina av manntalinum hesuferð, tí tað er umráðandi, at upplýsingarnar, sum koma inn, bert vera brúktar til hagtøl.

Eitt týðandi eyðkenni við hagtølum er, at tað er við lóg bannað at bera øðrum myndugleikum upplýsingar, sum koma inn. Eisini er bannað við lóg at almannakunngera hagtøl á ein hátt, so einstaklingar kunnu kennast aftur í tølunum.

## Altjóða átak

Eitt manntal er samstundis ein aljtóða hending. ST heitir javnan á øll heimsins lond um at halda manntal, fyri fáa hagtøl yvir, hvussu heimurin hevur tað. Næstan øll lond eru við í hesum átøkum.

ST sendi eisini Hagstovuni fyrispurning um ætlanir vóru at halda manntal í Føroyum. Nú eru Føroyar við á listanum yvir lond, sum hava sett sær fyri at halda manntal eftir leisinum hjá Sameindu Tjóða.

**Dømi um spurningar, sum verða við á manntalinum 2011**

| Um einstaklingin | Um húskið | Um bústaðin |
|---|---|---|
| • Hjúnalagsstøðu og børn<br>• Útbúgvingar<br>• Arbeiði og útkoma<br>• Ferðing til arbeiðis og í skúla | • Ættarbond<br>• Hjúna- og samlívsbond | • Plássviðurskifti innan og uttan<br>• Ognarviðurskifti, byggitilfar og standur<br>• Upphiting, køksviðurskifti og orkunýtsla<br>• Streym- og vatnveiting, baðiviðurskifti<br>• Frárensl og ruskinnheinting<br>• Húsarhaldstól og hentleikar<br>• Umsstøður at sleppa til og frá |


www.ns.fo
spar2
Alt gerst lættari...
Nú eisini galdandi fyri Mac teldur!
Nýggj víðkað útgáva av spar2
• Tú kanst gera uttanlandsflytingar (SWIFT flytingar)
• Tú kanst keypa og selja virðisbrøv
• Tú kanst bíleggja kort
...og mangt annað!
Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 475000 Fax 476000 ns@ns.fo www.ns.fo
GRAFIA


mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
SENDISTOVAN
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo

# Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV



# Inventar Tænastan

www.inventar.fo - Tel. 353800














## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo



FØROYABANKI

# Nýggj kundatænasta á telefon 330 330

**Kundatænastan er títt beinleiðis samband við bankan, har vit veita tær tænastur skjótt, greitt og uttan umstilling.**

**Í Kundatænastuni fært tú altíð samband við bankafólk, ið er til reiðar at avgreiða tíni ørindi skjótt og greitt. Tær nýtist sostatt ikki at bíða eftir tínum ráðgeva. Um tú hevur ørindi, ið krevja ráðgeving, stilla vit teg sjálvandi um.**

**www.foroya.fo**

SENDISTOVAN

## Ástarbrævið:

# Søga úr Letlandi

Tá ið eg hitti Martu fyri fyrstu ferð, var hon yvir fjøruti og rættiliga mishátt. Tað var eins og kloðsutur listamaður hevði skorið andlitið á henni út úr høðrum viði við hvøssum muddi, og stríðst úrlitaleyst við at fingið lag á ta breiðu nøsina, tey høgu kjálkabeinini og hin stóra munnin. Tey myrkabláu eyguni, undir teim svørtu eygnabrúnum, høvdu verið vøkur, hevði tað ikki verið í teimum henda hungrandi, slúkandi og biðjandi gløðini.

Løgið var tað kortini at Marta var gomul genta. Bygdagentan, sum verður tíðliga foreldraleys og eigur eitt sindur av jørð, átta kýr, tvey ross og stóran høsnagarð, plagdi ikki at ganga leingi ógift í gamla Lettlandi, har sum tað ofta var gingið í hjúnarlag meira fyri at knýta saman ein bóndagarð við ein annan enn brúður til brúðgóm. Men Marta legði einki í at giftast. Tær gomlu konurnar í bygdini teskaðu sína ámillum um ástarævintýrið, sum hent skuldi hava fyri einum tjúgu árum síðan – um ein prýðiligan men einkisverdag ungan russiskan húskall, Boris æt hann, sum var komin hagar eitt heystið at arbeiða í eplaveltunum.

”Hann helt hana fyri gjøldur,” segði ein gomul kelling við einum forbidnum smíli í sínum tannleysa skølti. – ”tey vóru trúlovað og ætlaðu at giftast á Mikkjalsmessu árið eftir. Men Boris skuldi fyrsta fara til Amerika. Hann segði seg eiga rík skyldfólk har vesturi, sum ivaleyst fóru at geva honum nakað av peningi, tá ið tey frættu, hvussu væl hann var komin fyri, og so kundu tey bæði Marta keypa sær eitt sindur av jørð frá grannanum ella mylluna kanska, tí malarin var vorðin so gamal og orkaði einki. Marta kærdi seg hvørki um jørð ella myllu, men Boris varð við sítt, og hon segði honum aldri ímóti.”

Tann gamla harkaði og spýtti ein fruktstein, sum hon hevði sitið og sogið. So helt hon áfram fegin yvir at hava funnið onkran, sum ikki kendi søguna:

“Boris segði henni, at hann mátti hava eitt sindur av peningi, hann kundi ikki koma til Amerika sum eitt vesælavætti. Og Marta seldi ein part av jørðini, fimm kýr, gullketuna og brúðarstásið, sum omma hennara hevði borið. Boris tók peningi, og tá ið hann um kvøldarnar sat á vertshúsinum saman við hinum húskøllunum, fá flenti hann og háðaði ljótu Martu, sum var so vælsignað býtt og góðtrúgvin. Tá ið eplini vóru upptikin var hann verðandi har í bygdini tann veturin og livdi sum ein greivi av ognunum hjá neyðars martu. Um várið fór hann avstað og kom aldri aftur. Síðan hevur Marta neyvan skift orð við nakran; hon situr bara heima og bíðar eftir Boris, tí búrkroppinum...”

Kanska hevur Marta funnið út av, at hon mátti tosa við onkran, og kanska hevur hon hildið tað fallið sær lættast at siga eini fremmandari konu frá søgu síni. Uttan so, ein dagin eg reið fram við húsum hennara, kom hon út og beyð mær at koma innar og drekka eitt glas av mjólk Hon kveitti rannskandi at mær, ivaðist eina løtu, andaði djúpt og segði:

“Tygum hava helst hoyrt allskyns sleygusøgur um meg. Men tygum skulu ikki trúgva øllum, sum sagt verður í bygdini. Hann hevur ikki svikað meg. Hann kemur aftur”

Hon reistist, eitt sindur tungliga, eins og kona ið komin er væl til aldurs, og boygdi seg yvir eina stóra, vakurt málaða kommodu. Hon dró eina skuffu út og tók fram eitt gamalt og litfagurt bræv. Tað var skrivað fyri mongum árum síðan, og var komin úr Brooklyn.

“Hann skrivaði mær bræv,” segði Marta og helt varliga í tað gulnaða brævið við sínum reyðu

fingrum. – “Hann skrivaði til mín. Yndislig orð. Ástarorð! Hann úthellir hjarta sítt í hesum brævi.”

Hon kveitti aftur upp á meg, og helt so áfram:

“Sjálvandi veit eg at hetta er ástarbræv. Kortini vildi eg fegin vitað akkurát, hvat hann hevur skrivað. Eg vil kenna hvønn setning, hvørt einasta orð og vita, nær hann kemur til mín.”

Eg man helst hava sæð nakað bilsin út, tí Marta skundaði sær at leggja afturat:

“Eg dugi ikki at lesa. Havi aldri lært tað. OG eg havi ikki viljað víst nøkrum brævið. Alt konufólkið í bygdini hatar meg, tí eg átti tann fittasta dreingin, og mannfólkini eru ónærilig við meg, tí eg vildi ikki giftast við nøkrum av teimum; eg visti fullvæl, at teir hugsaðu bert um at fáa hendur á jørðini. So eg havi goymt brævið ólisið. Men eg taki tað mangan fram úr skuffuni og royni at hugsa til, hvat í tístendur. Tað hevði glett meg ósigiligt, um tygum høvdu viljað lisið tað fyri mær.”

Eg tók brævið. Skriftin var barnslig og næstan ólesilig. Eg las brævið ígjøgnum, áðrenn eg las tað upp fyri Martu. Hon sat undir liðini á mær, altrá og stardi at mær við sínum slúkandi, biðjandi eygum.

Eg las brævið eina ferð, tvær ferðir, tríggjar ferðir. Tað fór ein slíkur gjóstur ígøgnum meg, og eg var um at svíma. Maðurin tóktist at hava verið drukkin, tá ið hann skrivaði brævið, og í fyllskapinum avdúkaði hann ein óflýggjaskap og eina óhumsku, sum eg aldri hevði hildi var til í nøkrum menniskja.

Í brævinum gjørdi hann ikki annað enn háðaði hesi ljótu og fávitskutu gentu, sum hevði trúð orðaskvaldri hansara um at hann elskaði hana. Í grovum orðum um hennara útsjónd og læt ikki ein blett óskemdan andliti hennara. Hann stuttleikaði sær yvir tær stóru eygnabrýrnar, sum hann helt líktust “bustum á svínum”. “hennara beinstóra kropp”, sum var eitt skrímsl, “tann stóra munnin sum á froski” .... Og tá ið hann var liðugur at háða andlitið og vakstrarlagið hjá neyðars Martu, breggjaði hann óført av tí vøkru amerikonsku gentuni, sum nú sat undir liðini á honum, yndislig blómandi, so snóhvít og angandi sum ein nýsprottin rósa. Hann greiddi so Martu frá, hvussu gentan flenti í kíki, tá hann segði henni frá tí býtta beistinum, sum hevði givið honum pengar fyri ferðina og til at liva fyri í hesum frálíka landi, har allar genturnar vóru so vakrar.

“Hvat skrivar hann” spurdi Marta altrá og hás av spenningi. – “hví lesa tygum ikki? Hvørjum bíða tygum eftir”

Eg skundaði mær so at penta nakað saman. Hvat skuldi eg annað gera? Skelvandi á málinum og harkandi segði eg henni, at Boris framvegis hugsaði um hana, og góðsku hennara og ta eydnuríku tíð, tey høvdu átt saman. Eg leyg framvegis, at hann tráðaði eftir at koma aftur til hana, og mundi koma onkran dagin, tá ið hon seinast væntaði tað, fyri at taka unnustu sína í favn og fyri aldri at skiljast frá henni aftur.

Í fyrstani gekkst mær ikki so væl at lúgva, tí eg var so illa til passar, køld og vildi spýggja bæði av samkenslu og andstygd. Men eftir nakrar teir fyrstu setningarnar lá tað heilt raðið, og íðin dró eg alt tað fram, eg minnist frá gomlum, víðagitnum ástarbrøvum, eg hevði lisið.

At endanum legði eg brævið frá mær á borið. Marta rætti seg eftir tí. Hon líktist einari skurðmynd, sum okkurt undurverk hevði birt lív í. Hon var ikki bert upplivað, men eisini fríðkað av hesi stóru sælu.

“Skrivaði hann alt hetta?” Teskaði hon – “Alt hetta? So nógv unnilig orð? Skrivaði av so stórum kærleika?”

Hon suffaði. – “Og at hugsa sær at eg skuldi kunnað lesa tað sjálv. Hví havi eg ikki lært meg at lesa? Vís mær á, hvar hann skrivar at honum leingist eftir nær. Og hvar hann skrivar at hann kemur aftur, tá ið eg seinast vænti hann.”

Eg peikaði á nakrar reglur á fyrsta arkinum og nakrar á tí seinasta –

Marta risti við høvdinum. “Hevði eg bert vitað hetta fyrr, tá ið eg var so ræðuliga einsamøll. Hevði eg bert kunnað lisið hetta deiliga brævið frá honum hvønn dag.”

Hon hugdi uppá meg sum eitt bar, ið biður bomm. – “Sig mær, er tað ringt at læra at lesa á mínum aldri?”

Eg var ræðslusligin – tað mundi vera øgiliga torført helt eg. “Hví vilja tyum læra at lesa – nú tygum vita, hvat stendur í brævinum?”

“Gaman í. Men kortini vildi eg so fegin dugað at lisið tað sjálv og sæð hvørt orð, sum í tí stendur. Eg haldi eg fari at tosa við skúlalæraran, og kanska....”

Hon tagdi. Eygu hennara vórðu so droymandi og eydnan lýsti úr teimum. Hon varnaðist tí ikki, at eg skíkti meg á dýr, eins og hevði eg framt eina brotsagerð.

Eftir tann dag reið eg aldri framvið hjá Martu av ótta fyri, at hon kanska fór at biðja meg um at lesa brævið uppaftur, og at eg so fór at siga okkurt, sum eg hevði ikki sagt ta fyrru ferðina, og soleiðis vakt illtanka hennara. Men frá tí láturmiklu gomlu kellingini frætti eg, at Marta vitjaði skúlalæraran hvønn einasta dag, og var har okkurt um ein tíma.

“Hon lærir seg at lesa,” segði tann gamla konan og flennti. “Hvør hevur hoyrt so skabt! Lærir seg at lesa á hennara aldri! Hon ætlar sær kanska at spæla fín? Hon hevur keypt sær eina stóra bók og situr í túninum og lesur hart: A-B-C-D-E; K-E-T-T-A.” Og allar konurnar flentu so tær mundu skrædnað. Sjálvt helt eg ikki hetta vera so avbæra láturligt, tvørtur ímóti, oe eg var við at gráta av samkenslu og ótta.

So kom heystið við illveðri. Stormarnir komu ýlandi yvir fløturnar, og dunið uttan av havinum larmaði ikki minni. Nakin og skelvandi stóu trøini og rættu út armar sínar, sum fyri at biðja um hjálp. Leyvið av teimum reyði ahorntrøðunum lá sum eitt kongaligt teppi á jørðini. SO kom kavin og huldi alt, sum alt so yvirnáttúrligt reint og hvítt, sum hevði verið so vátt og ótespiligt.

Eina náttina, tveir dagar fyri ól, fekk hesin hvíti heimurin ein fagurreyðan lit. Logar toygdu seg upp í lofti og lýstu upp skógina, og aftanfyri skógina gæsaði ein øgiligur eldur. Fólk tustu av stað hagar at berjast við eldin.

Ein roði á tí hvíta kavanum vísti teim leiðina. Tá ið teir komu til húsini hjá Martu sóu teir, at tey stóðu í ljósum loga. Høgættstormurin fýsti neistarnar langt upp í loft. Kýrnar beljaðu í fjósinum, rossini høvdu slitið seg leys og tustu , svøk av ræðslu, út úr loganum og út í myrkrið og kavan.

Frammanfyri tí brennandi lonini stóð eitt konufólk, og gráa hár hennara var sum ein ramma uttan um tað avskeplaða andlit og tey vitleysu eyguni. Hon flenti og látur hennara skar fram um beljið frá neytunum og brakið frá tí brennandi viðinum. Soleiðis stóð hon og flenti ein vitleysan, óhugnaligan láttur uttan íhald.

Marta hevði lisið brævið.



**Lat heldur okkum gera tað...**

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

**...húsavarðaarbeiði**
**...alt snikkara- og timburarbeiði**
**...umvælingar**
**...sethúsabygging**

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

**Húsavarðartænastan**

**Ognað tær tín egna húsavørð**

# Tekniski Skúlin í Tórshavn

.... skapandi umhvørvi

## Ein virkin og góður samstarvsfelagi



Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika

Tekniski Skúlin í Tórshavn, Postrúm 3239, 110 Tórshavn .Tlf. 738050 . www.tst.fo . T-postur tst@skulin.fo




demich
hiti | vatn | sanitet
Grønar orkuloysnir frá Demich
Nú er nýggja hitapumpan hjá Mitsubishi komin til Føroyar!
Við einum COP á 5,33 og einum hitaevni á heili 6,3 KW
• Serligt tøkni frá Mitsubishi electric
• Hitakapasitet á 1,5 upp til 6,3 KW
• COP á 5,33
• Sera still bert 20 dB. (stillasta á marknaðinum)
• Driftssikkur við lágan temperatur
• I-See sensor. Hesin leiðir hitan har tørvur er
• Reina og sunna luft við Plasma Duo Filtur
• Orkusparandi avrímingartøkni
• Nýggjan serligan kompressara
• Umhvørvisvinarligan kølimiðal
Serligt tøkni ger at pumpan gevur hita heilt niður til minus 15-25 gradir
20 dB(A)
Hitaorka (kw)
Uttandura hiti
Um dagin
Heitari luft verður send á kalda økið
Heitt økið
Um kvøldið
Heitari luft verður send á kalda økið
Kalt økið
Bert
15.900,-
v/ uppsetan
Demich P/F, Tórshavn
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
Telefon +298 309 310
Fax + 298 309 311
Demich P/F, Vágur
Marknoyrarvegur 36
Telefon +298 373 535
Fax + 298 373 565
Demich P/F, Saltangará
Heiðavegur 80
Telefon +298 444 500
Fax + 298 445 501
demich@demich.fo • www.demich.fo
MITSUBISHI ELECTRIC
Changes for the Better


Tú ert handverkarin!
... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín
Vit kunnu bjóða
• spennandi arbeiðsuppgávur
• ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
• starvsfólkamenning
• trivnað
Hevur hetta tín áhuga, ring so til
okkara ella send okkum
eitt teldubræv
SENDISTOVAN
LM ELECTRIC
Hoyviksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo
LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice
Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20


Nœr er kommunala brennistøðin opin?
Skriva rusk í einum sms
og send til 28 50 00
Tú fært svar beinanvegin!
Tórshavnar kommuna

Eik
Tryggari við fastari rentu
Fá tær realkredittlán frá okkum og slepp undan at hugsa um rentuhækkingar
www.eik.fo

# Ídnaðar- og garaguhurðar

**Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92**

**Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður**

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn




VARTA
THE BATTERY EXPERTS

Undir torførum arbeiðsumstøðum, bæði likamliga og fíggjarliga, er gott at sleppa undan kiksarum.

VARTA Semi-Traktion akkumulatorar eru gjørdir til tey serligu arbeiðsviðurskiftini á sjónum.
Tí brúka fleiri og fleiri fiskifør VARTA akkumulatorar frá fremsta akkumulatorframleiðara í Evropa.

Setiðtrygdina í hásætið
Nýtið VARTA Semi-Traktion ella Super Heavy Duty akkumulatorar - eisini næstu ferð.

## Battariír Til Øll Endamál

**Fartelifonir**



**Hoyri Apparatir**

**Ur og mangt annað**



**Eisini hava vit øll vanlig battariír**




**Heil- og smásøla, landsins bestu battariír, og landsins bestu prísir**

**PÓLAR**

Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 fartel. 21 28 60

elmek

v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo

*Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl*




Ú-DAGUR
22
JANUAR 2010
Gleð teg til Ú-dagin

Ring til okkara á 345 600 ella send okkum ein SMS til 1919 og skriva "ring" og vit ringja aftur til tín. Les meira á www.u-dagur.fo

Betri pensjón
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari


Flagsa
á netinum
- har, og tá tú vilt
Við Flags kanst tú flagsa á netinum við tíni fartelefon. Tú kanst lesa og skriva teldupost, lesa tíðindi, vera á Facebook og msn og gera alt tað, tú vanliga ger á netinum. Vit bjóða serligar Flags-pakkar, sum ger tað uppaftur lættari og bíligari at vera á.
Bílegg Flagspakkar við at senda sms boð til 1441.
Fá meira at vita á www.ft.fo
SilvurFlags
Mánaðargjald: 50 kr.
Íroknað 15 Mb download hvønn mánað
Kostnaður eftir 15 Mb: kr. 5,00/Mb
Bílegg: Send "SilvurFlags" til 1441
GullFlags
Mánaðargjald: 150 kr.
Íroknað 100 Mb download hvønn mánað
Kostnaður eftir 100 Mb: kr. 3,00/Mb
Bílegg: Send "GullFlags" til 1441
facebook
bwin.com
myspace.com a place for friends
FLAGS
FØROYA TELE